## DAGSINS MEINING

# Ivasamt endamál

Reyðabók hevur vakt ans ikki so nógv fyri innihaldið sum fyri sína tørvandi fakligu dygd. Einum nýtist ikki at vera søgufrøðingur enn minni professari fyri at síggja, at her er ymiskt, sum ikki fakliga stendur mát. Alt ov nógv verður til gitingar, samstundis sum víst verður til, at ávís skjalasøvn eru afturlatin fyri høvundanum. Hartil kemur, at útveljingin og viðgerðin av føroyska tilfarinum er milt sagt margháttlig. Tað er vánaligt vísindaligt háttalag at gita og entá gita seg fram til tað svar, ein ynskir sær ella enn verri: tað svar, sum eins politiski arbeiðsgevari helst vil hava.

Tað er tí neyðugt at spyrja, hvat endamálið er við hesi ritgerð. Tað kundi tókst, sum eitt endamálið er at peika út eina røð av syndabukkum á føroyska vinstravonginum. Tað er eitt óhugnaligt samanfall millum tey nøvn, sum koma fyri í Reyðubók og so tey fólk, sum áhaldandi vórðu fyri ágangi í Dagblaðnum í sjeyti og áttatíárunum. Hvat er endamálið við hesum? Hvat skuldi fyrrverandi løgmaður nýta hetta til? Hví setti fyrrverandi løgmaður hesa rannsókn í verk? Hann, sum annars ikki er kendur fyri at leggja fólki fortíðina til last, mátti vita, at arbeiðssetningurin kundi koma at føra til, at vinstrahallir føroyingar fóru at vera stigmatiseraðir.

Sostatt má áhaldandi spyrjast, hvat var endamálið? Tey, sum duga nútímans søgu, hava hoyrt um Macartyismuna í USA. Hetta var ein herferð móti vintsrahallum, intellektuellum og listafólkum. Mest navnframu offrini vóru Chaplin og Oppenheimer (hann við atombumbuni) fyri ikki at tala um hjúnini Rosenberg, sum endaðu sínar dagar í elektriska stólinum. Víst hevði henda herferð til endamáls at knasa amerikanska vinstarvongin, men aðalendamálið var at fremja politisku starvsleiðina hjá Macharty senatori og Nixon. Við at skapa eina ógvusliga og hóttandi fíggindamynd, skuldu politisku málini fremjast. Var tað veruliga so, at fráfarna samgonga, sum bílegði hesa margháttligu rapport, ætlaði at nýta hana sum politiskt vápn? Her eru nógvir ósvaraðir spurningar og fara vit at venda aftur til málið seinni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Peningur fossar úr landskassanum

**Høgni Hoydal**



Tá ið undanfarni løgmaður valdi at skriva val út og at senda fíggjarmálaráðharran til hús, legði hann landið í stjórnarloysi og landskassan í ongamannaland. Ætlaðar sparingar og nýggjar inntøkur, sum skuldu galda frá nýggjárinum vórðu ikki samtyktar, og tí kann úrslitið hjá landskassanum bara gerast verri, fyri hvønn dag, ið gongur. Ja, hetta kann kosta landinum stórar upphæddir og mistar inntøkur.

Landið hevur nú ligið við ongari fíggjarlóg í nærum tríggjar mánaðir. Ein bráðfeingis játtanarlóg varð samtykt 12. desember í fjør. Hon gevur bert heimild fyri, at skattir og avgjøld kunnu krevjast inn, og at landskassin kann gjalda tær mest neyðturviligu útreiðslurnar, sum landið hevur bundið seg til.

### Landsstýrið ongi tiltøk

Men onki bendir á, at nýggja landsstýrið hevur tryggjað sær, at pengar ikki verða brúktir út um tað, ið bráðfeingis játtanarlógin loyvir. Dagliga hoyra vit frá landsstýrinum um pengar, ið skulu nýtast her og har. Eisini verður sagt, at so og so nógvur peningur er settur av til ymisk endamál. Nýggja størv eru sett og eisini nýggir stovnar fráboðaðir. Stuðul verður útgoldin til ymisk endamál. Men her er ongin fíggjarlóg samtykt.

Sambært stýrisskipanarlógini skal ongin útreiðsla avhaldast, ið ikki hevur heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

### Fyrispurningur reistur á tingi

Tí setti undirritaði í Løgtinginum ein munnligan fyrispurning til Jóannes Eidesgaard, løgmann. Spurningurin var, um hann hevði tryggjað sær, at heimild var fyri teimum útgjøldum, ið fara fram í løtuni.

Svarið var sera ógreitt, men tað kom fram, at nýggja landsstýrið hevur ikki givið aðalstjórum og stovnsleiðarum greið boð um, hvussu farast skal fram, til ein fíggjarlóg, er samtykt.

Hetta er sera álvarsligt.

### Kunnu ikki flýggja undan ábyrgd

Vit hava hoyrt landsstýrismannin í fíggjarmálum tosa um komandi hall á fíggjarlógini. Men fyri hvønn dag, ið gongur, so fossar peningur úr landskassanum.

Tað ber ikki til hjá nýggja landsstýrinum at kasta ábyrgdina yvir á undanfarna landsstýri. Løgmaður eigur at tryggja sær, at heimildirnar eru í lagi og at alt verður gjørt fyri at hava tamarhald á útreiðslunum.

Tí fer Tjóðveldisflokkurin at fylgja hesum málinum upp.

# Mótstøða móti útskeinking

**Dánjal Petur Mariusarson**
*1. St. Georges Circus, London SE1 0AP*

»Tað sum var høvðusargumentið fyri at eg ikki tók undir við hesum, tað var tað, at hesin bygningurin hann liggur niðri á havnalagnum. Hann liggur millum ein veg sum hevur tunga ferðslu, og ein veg omanfyri sum hevur nógva ferðslu. Eg meini tað, at við teimum funktiónum sum bleiv upplýst í umsóknini skuldi vera á hesum staðnum, haldi eg ikki at tað er rætt at man fer at geva tilsøgn á havnalagnum til eitt dansistað, eina café og til frítíðarítriv.'

Højgaard, Kári P, Dagur og Vika, SVF 4. mars 2004.«

Eitt skal tú eiga, Kári: Tað er, at argumentini hevur tú ongantíð havt við tær.

Men, ugga teg við kann tú, at tann gongubreytin neyvan er tín eina.

Hevði tú av illum grundgivið fyri mótstøðu tíni móti útskeinking í Runavík, tí ætlaða hølið liggur ov nær bryggjukantinum, so var tað skilligt.

Men at geva nógvu ferðsluni skyldini, tað má metast sum eitt sjálvmál.

Runavík 0 - 1 Tórshavn.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Altjóða kvinnudagur 8. mars og javnstøðulógin

**Heidi Petersen**
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



Altjóða kvinnudagurin 8. mars gevur okkum høvi at varpa ljós á kvinnupolitiskar spurningar, og haldi eg tað tað vera hóskandi at gera eina lítla eftirmeting av javnstøðulógin nú hon skal hátíðarhaldast.

Javnstøðulógin verður í ár 10 ár, og verður hetta hátíðarhildi við stórari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum 10. mai. Endamálið við ráðstevnuni verður soleiðis lýst:

Endamálið við ráðstevnuni er at geva íblástur og vísa á gongdar leiðir fram móti einum rættvísum, demokratiskum og fjølbroyttum samfelag.

Í fyrireikingum hevur stórur dentur verið lagdur á at skapa eina skrá, sum bæði kynini halda vera áhugaverda. M.a. fyri at gera upp við fatanina hjá summum um javnstøðumál sum kvinnumál.

Eisini hevur dentur verið lagdur á góðsku. Framløgufólkini og orðstýrarin eru kend og hava skarað framúr á sínum øki. Norðurlandahúsið er valt sum karmur um ráðstevnuna. Oddvør Skarðhamar, sum er kend fyri sína góðu og fjølbroyttu matarskrá, borðreiðir á døgurða. Dagurin í Norðurlandahúsinum endar við einari hugnaligari løtu, har høvi er at tosa við framløgufólk og luttakarar um dagin og tey inntrykk, sum fólk hava fingið.

Ráðstevnan verður lýst við eini sera áhugaverdari skrá, har millum onnur Vígdis Finnbogadóttir, fyrrv. forseti Íslands, umrøður evni: Javnstøða - hví og hvussu? Vónandi fær tiltakið, sum javnstøðunevndin stendur fyri, góða undirtøku millum fólk, bæði kvinnum og monnum, so endamálið við ráðstevnuni, at skapa eitt rúm har bæði kynini møtast til orðaskifti um javnstøðu sum kvinnumál og mannsmál, verður nátt.

Hvat er so endamálið við javnstøðulógini frá 3. mai 1994. Í formælinum til lógina stendur soleiðis:

Endamálið við lógini er at beina burtur allan mismun vegna kyn.

Meginreglan er, at tað ikki er loyvt at gera mismun á fólki vegna kyn. §1, stk 2 er frávik frá hesum, tí har stendur, at tað er loyvt at tryggja øðrum kyninum serlig rættindi, um endamálið er at fáa javnstøðu á økinum.

- Starvsseting, løn og yrkis- og menningarmøguleikar eiga at vera tey somu fyri kynini bæði
- Foreldrafrávera eigur ikki at føra til, at starvsfólk ikki fáa somu sømdir sum onnur starvsfólk, tá um útbúgving og framflytan ræður
- Frálærutilfar v.m. skal samsvara javnstøðuhugsjónini
- Almennar nevndir og ráð skulu hava javnt kynsbýti

Hyggja vit eftir og meta um hvat vit hava fingið burturúr, at náa málinum sum javnstøðulógin setir, er lætt at fáa eyga á at misjavnt er við hvussu hevur gingist. Viðvíkjandi fyrsta málsetninginum haldi eg at vit eru komin rættiliga langt. Haldi at starvssetanir, løn og yrkis- og menningarmøguleikarnir eru um at verða eins fyri bæði kynini. Kvinnur tora betur at taka avbjóðingarnar upp á arbeiðsmarknaðinum, og menninir tora betur at halda seg til øki, sum sambært siðvenju eru kvinnuøki. Her manglar kanska tað at kvinnur halda seg framat teimum sokallaðu mannsøkjunum, men eisini her eru kvinnur um at koma við.

Næsti setningur, í endamálunum hjá javnstøðulógini um foreldrafráveru, haldi eg vera náddan. Grundin er serliga skipanin við barsilsgrunninum og avtalum á arbeiðsmarknaðinum, um fráveru vegna sjúk børn, har bæði foreldrini hava eitt ávíst tal av døgum, tey kunnu vera heima hjá sjúkum barni, fyri at takka.

Tá vit koma til frálærutilfar í allari okkara skúlaskipan, heilt frá fólkaskúla til fróðskaparsetur, er verri statt. Mær vitandi eru ongi ítøkili tiltøk sett í verk fyri at føroyskir skúlanæmingar og lesandi skulu fáa eina javnbjóðis mynd av leiklutinum og týdninginum hjá kvinnum og monnum í samfelagnum. So her er eitt øki sum arbeiðast má viðari við í komandi tíðum, og frá politiskari síðu eiga stig at verða tikin til at fáa gongd á eitt slíkt arbeiði.

Heldur ikki kann sigas, at nátt er á mál við seinasta setninginum í endamálinum hjá javnstøðulógini um, at almennar nevndir og ráð skulu hava javnt kynsbýti. Her haldi eg heilt einfalt at tað hevur skortað uppá politiskan vilja at fremja hendan málsetning. Undanførðslurnar eru nógvar, og orsøkirnar kunnu vera ymiskar, men eitt er heilt greitt, at tað altíð er trupult at víkja frá eini valdsposition.

Niðurstøðan er, at tað framvegis er nógv arbeiði hjá javnstøðunevndini eftir at gera, og vónandi fær nevndin góðar karmar at arbeiða undir. Mín vón fyri framtíðina er, at javnstøðunevndin kann víðka um sítt virksemi, til eisini at umfata útbúgvingar- og menningararbeiði, fyri at fáa fleiri kvinnur virknar í føroyskum politikki. Støðan í løtuni er ikki nóg góð á hesum øki, við bert trimum kvinnum á Løgtingi ella knapt 10% og 60 kvinnum í bý- og bygdarráðum ella 22%, er sjónligt at enn er langt aftir á mál,og vil eg gera mína ávirkan galdandi til tess at bøta um hesi viðurskifti.

# Fór so alt aftur í studning?

**Kjartan Kristiansen**
*Menningarstovan*



Vit eru á veg inn í búskaparligan tronga. Vónandi er talan bert um eitt nos og ikki eina veruliga kreppu. Men hvat tað so verður, verða vit aftur mint á, at tað nyttar ikki í hesum tíðum at gera tað sama, sum vit gjørdu fyrr. Krøvini fyri at vera uppi í herðast hvønn dag, og marknaðurin spyr ikki eftir tí sama sum í áttati-árunum. Fylgja vit ikki við, liggja vit skjótt og damla í einsemi og draga svart.

### Nýhugsan krevst

Nýhugsan kemur ikki úr Løgtinginum. Alt gott at siga um okkara fólkavaldu, men teirra uppgáva er ikki at ganga á odda. Tað er luturin hjá vinnuni - váðafúsari vinnu; vinnu, ið ikki liggur á landskassanum at fáa stuðul.

Nýhugsan er avgjørt ikki at finna nýggjar vegir at lata vinnuni studning. Bæði EF og EFTA hava hugsað gjølla um allar studningsmøguleikar og hava reglur um, hvørjar eru loyvdar og hvørjar ikki.

### Studningshótt Vágsbygd

Sunnara helvt í Suðuroy er í løtuni vinnuliga illa fyri. Stóra kreppan í níti-árunum bar stór afturstig við sær, og nýggja kreppan í alivinnuni hevur nú tikið burtur tey arbeiðspláss, sum vórðu skapt eftir kreppuna.

Í bløðunum í seinastu viku frættu vit, at Vágbingar vilja hava, at leigusáttmálin um øki á havnarlagnum verður hildin. Bygningarnir á økinum eru á leigari grund, og leigusáttmálin setir treyt um virksemi. Verður henda treyt ikki hildin, kann kommunan krevja at yvirtaka bygningarnar.

Fiskavirking, sum fekk bygningarnar sum part í kreppuloysnini, játtar, at bygningarnir fara at verða brúktir vinnuliga, og so skuldi alt verið í lagi.

Men so stinga hógvarnir knappliga undan. Alt hevði verið so ólíka lættari, um tað bar til at virka frystan russarafisk í Vági. Hesin fiskur kann fáast til keyps og virkast til frálíka ES-marknaðin, og so fáa Vágbingar aftur arbeiði.

Sjálvsagt kann hetta ikki verða gjørt í morgin sum ein annan dag. Tann studningur, sum fyrr varð latin til Fiska-virking til virkingar av innfluttum russarafiski verður ikki longur latin. Tí má tað almenna uppí og aftur lata henda studning, svarandi til tollin, ið annars skuldi verið goldin av hesum fiski, fór hann beinleiðis inn á ES-marknaðin.

Hokus pokus. Um bert tað almenna kann seta í gildi aftur studningin at virka russarafisk, eru Vágbingar og Fiskavirking væl fyri. Kravið frá Vágs kommunu um, at virkisbygningarnir verða nýttir til virkingar, kann nú verða vent ímóti landskassanum. Hesa nýhugsan kunnu helst øll taka undir við, og hon er løtt at fáa løgtingsmenninar í Suðuroy at arbeiða fyri.

Aðrir sleppa ikki framat at royna seg í Vági, og talan er heldur ikki um at brúka stak bíliga Føroya-fiskin. Fiskavirking verður sitandi á virkisbygningunum í Vági, meðan stuðul til russarafisk verður viðgjørdur. Uppskotið er sum at blaka torvmold í eyguni á fólki.

### Studningur mennir ikki - men bindur

Fyrst í níti-árunum skiltu Føroyingar, at studningur og almenn innblanding var av tí ónda. Bæði forða fyri menning og marknaðartillaging. Tí var eisini umráðandi, at russara-stuðulin ikki varð givin longur, enn neyðugt var fyri umstrukturering og øðrum varandi loysnum.

Russarastuðulin varð givin í tíggju ár, og verður nú ikki givin longur, sjálvt um lógarheimild helst enn er fyri tí. Men skal hann verða veittur aftur, eru óráð at veita hann í ósambæri við góðkendar studningstreytir í teimum londum, vøran skal verða seld til.

Hetta veit Fiskavirking. Tí mást tú spyrja, hvørji ørindini eru við russarastuðli til Vágbingar.

Vinnuligir trupulleikar og stígur eru ikki bara í Vági, tó teir eru serliga ringir har. Um alt landið vena virki og skip seg. Alivinnan hevur tað serliga ringt, og tænastuvinnurnar hjá fiski- og alivinnuni merkja eisini minkandi eftirspurning. Góðu tíðirnar seinast í níti-árunum vórðu ikki brúktar til varandi at bøta um kappingarførið á krevjandi marknaðum. Teir studningar, sum framvegis hava verið veittir, tykjast heldur at hava hildið virkjum føst í gomlum vøru- og framleiðslumynstri - og nú fær arbeiðsmaðurin skylduni.